# SUMBIAR KOMMUNA

## STÝRISGERÐABÓK 2015

## 3/13-03-2015

| | | |
|---|---|---|
| **Fundur nr. 3**<br>Tíð: **13. Mars. 2015, kl. 20:00**<br>Stað: **Kommunuskrivstovan** | Notis: | |
| Fastir fundardagar:<br><br>09.01 – 06.02 – 13.03 – 17.04 – 22.05 – 25.06 – 07.08 – 04.09 – 09.10 – 13.11 – 18.12 | Møttir:<br>Eyðbjørn Thomsen<br>Brynleif Bech<br>Niclas Hentze<br>Frits Poulsen | Uttan:<br><br>Rúni Lisberg, fráboða at hann er burturstaddur í arbeiði.<br>Einki eyka umboð var tøkt til fundin. |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 03/01**<br><br>• **(a) Umsókn um stuðul frá Hvistan.**<br>• **(b) Umsókn um stuðul frá Barnabati til kanningar verkætlan.**<br>• **(c) Umsókn um stuðul frá SSB til eina arbeiðsdrakt.**<br>• **(d) Umsókn frá Chewly. (*Fiktiv umsókn*)** | • (a) Samtykt at stuðla við 1.000,- kr.<br>• (b) Samtykt at stuðla við 1.000,- kr.<br>• (c) Samtykt at stuðla við útvegan av einari drakt.<br>• (d) Samtykt varð ikki at stuðla hesi ætlan. |
| **Mál nr. 03/02**<br><br>• **Brunaviðurskiftini í Sumbiar skúla.** | • Kommunustýrið samtykti at fáa eina brandávaringarskipan í skúlan fyri tað núverandi. Eisini var samtykt at hyggja uppá verandi rýmingarvegir. |
| **Mál nr. 03/03**<br><br>• **Umsókn um keyp av grundstykki matrikul 29g í Sumba.** | • Samtykt var at útvega matr. Nr. 29g frá Búnaðarstovuni, og síðani selja tað víðari til umsøkjaran við teirri treyt, at um ikki verður bygt innan 2 ár frá yvirtøkudegnum, fellur stykkið aftur til kommununa |
| **Mál nr. 03/04**<br><br>• **Umsókn um stuðul til útbúgving sum smábarnakonsulentur.** | • Samtykt var ikki at stuðla umsóknini, um stuðul til at taka eina útbúgving sum smábarnakonsulentur.<br><br>Sumbiar kommuna metir ikki at hendan umsóknin skal stílast til kommunurnar, men átti at verið send til arbeiðsgevaran hjá viðkomandi umsøkjara. |
| **Mál nr. 03/05**<br><br>• **Umsókn um marknaumskipan frá matr. Nr. 293a til samanlegging við matr. Nr. 1a** | • Samtykt var at taka undir við hesari marknaumskipan. |

| | |
|---|---|
| **Mál nr. 03/06**<br><br>• **Bøta um arbeiðsviðurskiftini tá grivið verður í kirkjugørðunum í Sumba og á Leiti.** | • Samtykt at keypa 2 “bakkar” til moldverju tá grivið verður. |
| **Mál nr. 03/07**<br><br>• **Byggisamtyktin fyri Sumbiar sókn.** | • Kunna var um, at uppskot til broytta byggisamtykt, er komin aftur frá løgfrøðinginum, og verður hendan viðgjørd á næsta bygdarráðsfundi |
| **Til kunningar.**<br><br>• **Fundurin íð skuldi verða 17.04,2015 verður ístaðin 12.04.2015.** | • Samtykt at flyta fundin til 12. Apríl 2015<br><br>• Kunnað var um at Anna Djurhuus varð sett sum leiðari á Bú- og heimatænastuni í Suðuroynni |
| **Til støðutakan ella lukkaðan fund.**<br><br>• **Eitt mál frá síðsta fundi.** | |

Fundurin lokin kl. 23:30

Eyðbjørn Thomsen Frits Poulsen Niclas Hentze

Brynleif Bech

SUMBIAR SÓKNAR KOMMUNA